DANMARKS NATIONALBANK

9. JANUAR 2023 — NR. 1

FØROYSKUR BÚSKAPUR

# Hákonjunkturur og vaksandi tørvur fyri broytingum

### Búskapurin megnar kreppuna

Sum í øðrum londum hevur inflasjónin tikið dik á seg í Føroyum farna árið. Fiskaútflutningsprísurin er eisini vaksin munandi, og tað hevur gagnað fiskivinnuni og hevur styrkt hákonjunkturin. Saman við lítlari skuld og einum sterkum arbeiðsmarknaði gevur tað føroyska búskapinum góðar fortreytir fyri at megna kreppuna.

### Rentuhækkingar og stórt tal av bústaðarlánum við broytiligari rentu

Stóra talið av bústaðarlánum við broytiligari rentu, sum stundum hava stutt til næstu rentutillaging, merkja, at rentuhækkingarnar skjótt enda hjá føroysku sethúsaeigarunum. Saman við øktu rentunum fyri bústaðarlán í 2022, ger økta inflasjónstrýstið, at tað sannlíkt fer at vera torførari hjá føroyskum sethúsaeigarum at gjalda sína skuld.

### Demografiskar broytingar geva avbjóðingar

Lutfalsliga færri føroyingar fara í framtíðini at vera í arbeiðsførum aldri, og parturin, sum fer at tørva røkt, fer at vaksa. Tað fer at leggja trýst á almennu útreiðslurnar. Føroyar hava í verandi hákonjunkturi havt hall á fíggjarlógini, sum vísir á, at tørvur er á broytingum.

INNIHALD

2 HÁKONJUNKTURUR OG TRÝST FRÁ INFLASJÓNINI

5 FØROYSKIR BANKAR ERU BETRI ÚTGJØRDIR TIL AT HANDFARA TAP

7 DEMOGRAFISKA GONGDIN GER AT TØRVURIN FYRI BROYTINGUM ØKIST

# Fólkatal Føroya nú og í framtíðini




| | |
|---|---|
| **Fólkatal** | 54.081 tann 31. august 2022 |
| **BTÚ fyri hvønn íbúgva** | 431.000 kr. í 2021 |
| | 425.000 krónur í Danmark til samanberingar |
| **Arbeiðstíttleiki** | 84 pst. í 2021 |
| | 77 pst. í Danmark til samanberingar |

## Hákonjunkturur og trýst frá inflasjónini

Føroyar eru í einum hákonjunkturi við sera lítlum arbeiðsloysi og høgum fiskaútflutningsprísi. Av tí at tað longu frammanundan eru fá, ið ikki eru partur av arbeiðsmegini, er torført hjá vinnuni at fáa nýggj starvsfólk til økta virksemi.

Arbeiðsloysið er lækkað støðugt seinastu tíggju árini og var í september niðri á 151 fulltíðar-arbeiðsleysum, sum svarar til 0,5 pst. av arbeiðsmegini, sí mynd 1. Í sama tíðarskeiði er arbeiðsmegin munandi vaksin, m.a. orsakað av tilflyting.

**Nógv inflasjón**
Brúkaraprístølini í Føroyum eru eins í Evropa vaksin sera nógv. Síðani fyrst í 2021 hevur gongdin í brúkaraprístalinum tikið dik á seg og var í 3. ársfj. 2022, sløk 10 pst. meiri enn árið frammanundan. Gongdin fylgir neyvt tí donsku, sí mynd 2.

Verður sæð burtur frá orkuprísunum, sum hava verið óvanliga óstøðugir, er inflasjónin í Føroyum góð 6 pst. sum er eitt vet omanfyri ta donsku.

Samanbering av føroysku prísgongdini við gongdina hjá øðrum londum er ikki heilt gjøgnumskygd (samanberilig), tí vektirnar í brúkarakurvini í Føroyum ikki verða dagførdar leypandi. Vektirnar eru grundaðar á eina brúkarakanning frá 2007, so at útroknaða inflasjónin verður roknað eftir, at nýtslumynstrið hjá føroyingum ikki er broytt síðani tá. Eftirsum at fólk vanliga broyta nýtslu í mun til vørur, ið gerast lutfalsliga bíligari, merkja fastar vektir, at inflasjónin sannlíkt er mett í ovara lagi. Var sama grundarlag nýtt í Danmark, hevði inflasjónin í 3. ársfj. Í 2022 verið eitt gott prosent hægri.

Orkuveitingin í Føroyum er tengd at olju, og ikki at russiskum gassi, sum tað er í Evropa. Oljuprísirnir hava verið støðugari enn gassprísirnir, men eru tó vaksnir nakað væl – uml. 33 pst. frá 3. ársfj. 2021 til 3. ársfj. 2022. Orkuprísvøksturin stendur fyri uml. 2,5 prosentum av føroysku inflasjónini. Til samanberingar stóð orkuprísvøksturin fyri 3,4 prosentum av donsku inflasjónini í sama tíðarskeiði.[1]

**Ósamsvar ímillum inflasjón og búskaparárin**
Tað hevur gagnað føroysku fiskivinnuni, at óvanliga góðir fiskaprísir hava verið seinastu árini. Hjá teimum flestu í vinnuni hava prísirnir verið nóg góðir til, at teir hava vigað upp fyri vaksandi prísum av t.d. fóðri og brennievni. Vøksturin í laksaprísinum var t.d. 48 pst. frá 2021 til 2022, meðan oljuprísurin í sama tíðarskeiði vaks við 43 pst. Vinningurin av høgu fiskaprísunum síggjast aftur í virðinum av føroyska útflutninginum, sum higartil er 39 pst. størri í 2022 enn somu mánaðar í 2021, sí mynd 3.

Av tí at lønveitingarnar í fiskivinnuni vanliga eru knýttar at veiðuvirðinum, hava stóru útflutningsprísirnir givið fiskivinnuni møguleika at útgjalda meiri í løn, í kappingini um arbeiðsmegina. Lønarútreiðslurnar fyri hvørt fólkið innan fiskivinnu og aling vaks frá 2012 til 2022 við 37 pst., meðan vøksturin í búskapinum annars var 25 pst. Hetta svarar til ávíkavist 3,2 og 2,2 pst. hvørt ár.

Í útgangsstøðinum er tað positivt, at lønarvøksturin í fiskivinnuni, orsakað av øktari framleiðslu, dregur arbeiðsmegi at sær úr øðrum vinnum. Sum heild økir tað um føroyska framleidnið. Tað kann tó eisini elva til at føroyski búskapurin verður enn meiri miðsavnaður

**Lítið arbeiðsloysi og vaksandi arbeiðsmegi** Mynd 1




Kelda: Hagstova Føroya.

**Inflasjónin í Føroyum er nær við ta donsku** Mynd 2




Viðm.: Myndin vísir hvussu brúkaraprístalið, ikki íroknað leiguvirði av egnum bústaði og goldna rentu av realkredittlánum, hækkar ár fyri ár, Hetta ger at donsku og føroysku brúkaraprístølini eru meiri samanberilig. Heilar strikur vísa inflasjón, brotstikur vísa inflasjón u/orku.
Kelda: Hagstova Føroya.

1 Mált sum HICP.

kring fiskivinnuna, sum harvið ger búskapin meiri viðkvæman fyri sveiggjum.

Ein útflutningsvinnugeiri, sum liggur langt á odda í lønarveitingum, kann eisini gera tað truplari hjá restini av vinnuni í Føroyum. Er ætlanin t.d. at økja um eldrarøktina, so hvørt sum demografiska gongdin skeiklast, kann tað gerast trupult at fáa nóg mikið av arbeiðsmegi.

**Hóvligur lønarvøkstur**
Ósmidligi arbeiðsmarknaðurin, samanborin við høgu inflasjónina og vaksandi útflutningsprísirnar, sær higartil ikki út til at hava havt stórvegis árin á lønartrýstið í Føroyum, sí mynd 4. Miðal lønarvøksturin seinastu tíggju árini hevur verið uml. 2,2 pst. (mált sum lønarsummur fyri hvørt starvsfólk). Lønarútreiðslurnar í 2022, hava higartil ligið uml. 3,5 pst. omanfyri somu mánaðar í 2021. Tað sýnir ein vøkstur í lønarútreiðslum, fyri hvørt starvsfólk, upp á 13,2 pst. í fiskivinnuni og 1,6 pst. í restini av búskapinum.

Av tí at setanarsáttmálarnir eru samansettir sum teir eru, vaksa og minka lønirnar í fiskivinnuni saman við vinninginum í vinnugreinini og vøksturin fer tí neyvan at elva til stúran um eina løn-prís-ringrás.

**Handils og fiskivinnusáttmálar við Russland gagna føroyskari fiskivinnu**
Tað gagnar føroysku fiskivinnuni væl, at tað ber til at fiska í ymsum sjógvi, so at vinnan ikki er bundin av, at fiskurin júst svimur í føroyskum sjógvi. Ein røð av altjóða sáttmálum, hava søguliga havt við sær, at grannalond kunnu fiska í sjónum hjá hvørjum øðrum. Hetta hevur verið eitt slag av váðaspjaðing. Í november í 2022, gjørdu Føroyar, eins og Noreg fyrr í árinum, longdan sáttmála við Russland. Sáttmálin gevur føroyingum atgongd til russiska partin av Barentshavinum, í býti við, at russisk før fáa atgongd til føroyskt sjóøki.

Umframt fiskivinnusáttmálan hevur Russland eisini verið størsti keypari av føroyskum fiski í fleiri ár. Tað broyttist í 2022. At kalla eingin fiskur er higartil seldur til Russlands. Av tí at revsitiltøkini móti Russlandi ikki fevna um matvørur, er orsøkin, at virki sjálvi hava valt, at tey ikki selja til Russlands.

Nú henda greining verður skrivað, er enn ov tíðliga at gera upp russlandshandilin fyri 2022, av tí at sildatíðin ikki enn er við í dátunum. Onnur fiskasløg verða seld í nógvum londum, men við sildini vísir

**Vøkstur í útflutningi verður borin av vaksandi fiskaprísum á heimsmarknaðinum** Mynd 3




Viðm.: Myndin vísir prísgongdina hjá føroyska laksa- og makrelútflutninginum. Útflutningurin av ávíkavist laksi og makreli, var í 2021 45 og 23 pst av samlaða føroyska útflutninginum. Fiskur stendur samanlagt fyri uml. 95 pst av føroyska vøruútflutninginum.
Kelda: Hagstova Føroya.

**Lønarvøksturin framvegis hóvligur** Mynd 4




Viðm.: Myndin vísir vøkstur í lønarupphædd fyri hvørt starvsfólk í Føroyum. Súlurnar vísa dátur hvønn mánaða fyri árliga vøksturin. Strikan vísir 6-mánaðar glíðandi miðalið. Tal av løntakarum verður ikki talt dupult, um ein hevur fleiri størv. Nýggjasta dátupunkt er frá september í 2022.
Kelda: Hagstova Føroya.

tað seg at vera torført at finna aðrar útflutningsmarknaðir enn Russland. Tað kann tí væl enda við, at útflutningurin til Russlands gerst ein størri partur fyri tað, sum eftir er av 2022, enn tað hevur verið fram til redaktiónstíðarskeiðið.

## Føroyskir bankar eru betri útgjørdir til at handfara tap

Meginparturin av allari lánveiting í Føroyum, verður framd av teimum fýra føroysku peningastovnunum. Teir standa eisini fyri at umsita realkredittlánini, av tí at samstarvsavtalur eru gjørdar við donsk realkredittfeløg um at fíggja privatar bústaðir í Føroyum.

Útlánið til føroysk húsarhøld og virki vóru í oktober 2022 ávikavist uml. 6 pst. og 2 pst. meiri enn árið frammanundan.[2] Útlánsvøksturin til virki er minkaður munandi síðan miðskeiðis í 2021 og tað kann koma av, at lánifyrispurningarnir frá føroysku virkjunum er tálmaður.

**Vøksturin í bústaðarlánum skal síggjast í samanhangi við vaksandi bústaðarprísir**
Bústaðarlán frá føroyskum bankum, og donskum realkredittstovnum, telja umleið helmingin av samlaðu útlánunum hjá peningastovnunum í Føroyum. Bústaðarlánini vóru knapt 7 pst. størri í oktober 2022 enn árið fyri. Bústaðarlánini hava verið í vøkstri seinastu árini, sum skal síggjast í samanhangi við vaksandi bústaðarprísirnar, serliga í Tórshavn, sí mynd 5.

Bústaðarprísirnir í Føroyum hava verið vaksandi m.a. av vaksandi nettoinntøkum. Ein stórur fólkavøkstur síðani 2013, og fallandi rentustøði fram til endan av 2021, hava eisini økt um eftirspurningin eftir bústøðum. Samstundis hevur útboðið av bústøðum ikki fylgt við økta eftirspurninginum.[3]

Føroyski bústaðarmarknaðurin er merktur av, at meginparturin av útlánunum til bústaðarkeyp eru við avdrátti. Hetta betrar um mótstøðuførið hjá føroysku sethúsaeigarunum í mun til afturgongd í búskapinum.

**Stórur vøkstur í íbúðarkostnaði seinastu árini** Mynd 5




Viðm.: Tølini fyri 2022 fevna einans um handlar, ið eru framdir í 1.-3. ársfj.) og tí er ein ávís óvissa heft at tølunum.
Kelda: Hagstova Føroya, BankNordik og egnar útrokningar.

**Føroyskir sethúsaeigarar verða ávirkaðir av rentum**
Flestu føroysku sethúsaeigararnir hava broytiliga rentu á bústaðarlánum sínum, sí mynd 6, vinstrumegin. Hjá uml. 85 pst. av bústaðarlánunum við broytiligari rentu, er minni enn eitt ár til næstu rentutillaging. Vaksandi renturnar fara tí skjótt at raka rentuútreiðslurnar hjá føroysku sethúsaeigarunum.

Renturnar av føroyskum bústaðarlánum hava verið vaksandi í 2022, men byrjaðu lágt, sí mynd 6, høgrumegin. Rentuhækkingarnar koma omaná, at inflasjónin leggur stórt trýst á føroyska búskapin. Samanumtikið má væntast, at vaksandi rentuútreiðslurnar av bústaðarlánum, og prísvøksturin sum heild, fara at gera tað torførari hjá føroysku sethúsaeigarunum at gjalda sína skuld.

Rentustuðulin av bústaðarlánum taka tó nakað av ávirkanini, sum rentuhækkingarnar hava á búskapin hjá føroysku sethúsaeigarunum. Rentustuðulin lækkar rentuútreiðslurnar við 35 pst. av rentuútreiðslunum, tó í mesta lagi 100.000 kr.

2 Útlán frá føroyskum peningastovnum og donskum realkredittstovnum.

3 Sí Adrian Michael Bay Schmith og Flora Nagy, Hákonjunkturin hevur fingið ferðina aftur, *Danmarks Nationalbank Greining (Føroyskur búskapur)*, nr. 27, 18. novembur 2021 (*leinki*).

**Føroyskir sethúsaeigarar hava í stóran mun broytiliga rentu á bústaðarlánunum og eru nú farin at rinda meiri í rentu**

Mynd 6







Viðm.: Myndin vinstrumegin: Útlán til bústaðir hjá føroyskum húsarhaldum (ikki írokn. persónlig virki), frá føroyskum peningastovnum og donskum realkredittstovnum. Hjá fastrentaðu bústaðarlánunum hava nógv tey flestu fleiri enn 10 ár til næstu rentutillaging. Dátur fyri oktober 2022 Myndin høgrumegin: Rentan hjá føroyskum og donskum realkredittstovnum (írokn. Gjøld) fyri útlán til bústaðir hjá føroysku húsarhaldunum (ikki írokn. persónlig virki). Ein einstøk dáta er ikki við, orsakað av trúnaði. Nýggjasta dátan er frá oktober 2022.
Kelda: Danmarks Nationalbank.

**Føroyskir bankar hava nakað minni part av bráðfeingis vinnulánum enn danskir bankar**

Vinnukundarnir hjá føroysku peningastovnunum síggja sum heild út til at standa seg væl. Tað sæst av, at føroysku peningastovnarnir hava færri bráðfeingis útlán og veðhald til vinnukundar enn donsku peningastovnarnir, sokallaðu peers, hava, sí mynd 7. Lágar niðurskrivingar og fleiri stórar niðurgjaldingar frá vinnuligum útlánum síðani 2016 benda harumframt á, at gongdin í kredittgóðskuni hjá vinnukundunum hevur verið positiv.

Eginpeningsavkastið hjá føroyska vinnulívinum var í 2020 og 2021 umleið tað sama sum søguliga miðaltalið fyri 1998-2021. Hetta kemur tó í kjalarvørrinum av fleiri árum við stórum vinningi, og tryggleikastigið/soliditetsgradin er nærum søguliga høgt. Sædd undir einum eru føroysk virki sostatt betri fyri at standa seg móti tapi, um t.d. innflutningsprísir vaksa ella konjunkturarnir í búskapinum venda og elva til at virkistreytirnar versna.

**Eitt vet færri bráðfeingis lán o.a. til vinnulívið í føroyskum peningastovnum, samanborið við danskar**

Mynd 7




Viðm.: Dátur fyri ultimo 1. Hálvár 2022. Bráðfeingis lán og garanti hjá peningastovnunum til einstøku vinnugreinarnar í pst. av útlánum og garantium í einstøku vinnugreinunum. Prosentpartar í klombru vísa útlán og veðhøld hjá føroysku peningastovnunum í pst. av teirra útlánum og garantium til vinnulívið sum heild. Útlán og garanti til vinnugreinar, sum eru minni enn 5 pst. av útlánunum og garantiunum hjá føroysku peningastovnunum samanlagt, eru ikki við. Samanborið er við peningastovnar í bólki 2 og 3 hjá Fíggjareftirlitinum.
Kelda: Fíggjareftirlitið og egnar útrokningar.

**Føroysku peningastovnarnir hava vart seg betur móti tapi**
Føroysku peningastovnarnir eru eisini betri kapitaliseraðir seinastu árini, sí mynd 8. Tað ger, at teir eru betur fyri at standa seg ímóti komandi tapi, sum vanligi raksturin ikki megnar at verja seg fyri. Framgongdin í kapitalkjarnuprosentinum hjá føroysku peningastovnunum hevur eisini havt eitt positivt árin á kapitalyvirdekningin, nú ið meiri frástøða er frá regulatorisku krøvunum enn áður.

Vinningurin hjá føroysku peningastovnunum hevur verið merktur av sveiggjunum á fíggjarmarknaðinum í 2022 og eginpeningsavkastið er komin niður á eitt støði, sum liggur undir miðal avkastið síðani 2017. Hinvegin hevur vinningurin í 1.-3. ársfj. 2022 verið grundaður á afturberingar av niðurskrivingum.

Fyri føroyska búskapin hevur tað týdning, at peningstovnarnir eru førir fyri at standa ímóti stoytum og tapi frá kundum, so at teir kunnu umsita kapital og tænastuveitingar, eisini í búskaparligari afturgongd. Tað er ikki minst galdandi fyri teir størstu bankarnar í Føroyum, BankNordik og Betri Banki, sum hvør sær javnviga við umleið helvtini av føroyska BTÚ í 2021, og eru lýstir sum systemiskt týdningarmiklir fíggjarstovnar í Føroyum.[4]

**Føroysku peningastovnarnir hava vart seg betur móti tapi** Mynd 8




Viðm.: Kapitalyvirdekningurin fyri føroysku peningastovnarnar er uppgjørdur sum veruligi kjarnukapitalurin har samanlagda kapitalkravið til veruliga kjarnukapitalin (írokn. kapitalbuffarar) er drigið frá. Nýggjastu dátur eru frá 3. ársfj. 2022.
Kelda: Fíggjareftirlitið.

Yvirskipað er føroyski búskapurin sunnur við nógvum virksemi, lítlari almennari skuld og ognum uttanlands. Sum útgangsstøði er føroyski búskapurin sostatt lutfalsliga mótstøðuførur til at megna eitt tíðarskeið við búskaparligari afturgongd.

## Demografiska gongdin ger at tørvurin fyri broytingum økist

Føroyski búskapurin er lutfalsliga einsháttaður og er sera tengdur at fiskivinnuni, sum er sermerkt av, at tað ikki ber til at vita, hvussu vinningurin fer at vera. Júst henda fortreyt ger, at tað er serliga týdningarmikið at nýta góðar tíðir, til at fyrireika seg til verri tíðir, tá ið tað t.d. kann gerast neyðugt at læna pening úr útlondum. Tað kann t.d. vera at økja útlendskar ognir og at tryggja at búskaparligi bygnaðurin er gagnligur. Verður neyðugt at læna pening uttanlands, er umráðandi, at føroyski búskapurin framvegis er góður, og at íleggjarar meta tað sum sannlíkt, at Føroyar fara at megna at venda gongdini – eisini hóast høvuðsvinnan verður hart rakt, og ein stórur partur av arbeiðsmegini kanska fer av landinum.

**Demografiin fer sum frá líður at vera ein avbjóðing fyri almenna búskapin**
Eins og mong onnur lond fer ein munandi broyting fram í fólkasamansetingini tey komandi áratíggjuni. Mongdin av børnum og eldri, í mun til fólkamongdina í arbeiðsførum aldri, hevur síðani 1985 støðugt verið 60 pst. Tað merkir, at fyri hvørji tíggju fólk í arbeiðsførum aldri, eru 6 børn og eldri, sum vanliga fáa meiri pening frá tí almenna, enn tey gjalda í skatti. Longu í 2030 verður væntað, at talið vekstur til góð 70 pst. og tá ið vit nærkast 2060 til 90 pst., sí Mynd 9.

Umframt at tey uttanfyri arbeiðsføra aldurin økjast, fara tey, sum eru pensjónistar eisini at eldast. Av tí at heilsuútreiðslur vaksa, so hvørt sum livialdurin økist, leggur tað enn størri trýst á almennu útreiðslurnar. DREAM-bólkurin hevur t.d. útroknað almennu útreiðslurnar pr. fólk í Danmark at vera tvær ferðir størri fyri 80 ára gomul enn fyri 65 ára gomul í 2014.[5]

4 Sí árliga pressuskrivið frá Fíggjareftirlitinum, sum ásetur SIFI-peningastovnar, 24. juni 2022 (*leinki*).

5 Sí DREAM, Samfelagsbúskaparligar avleiðingar av sunnari ellisárum, 2021 (*leinki*).

Í Føroyum væntast, at tey omanfyri 65 fara at økjast frá 18 pst. í dag til 27 pst. í 2060. Hjá teimum eldri enn 80 ár verður økingin lutfalsliga størri. Væntað verður, at bólkurin fer frá at vera 4,5 pst. av fólkatalinum til uml. 11 pst., sí mynd 9. Tá ið hetta gerst veruleiki, má tað væntast, at tað fer at vera munandi verri fyri almenna búskapin.

Hjá flestu londum eru demografiskar forsagnir vanliga rættiliga beinraknar, tá ið tær eru stutt- og miðalskygdar. Orsøkin er, at meginparturin av fólkavøkstrinum stavar frá burðaravlopinum, sum rímiliga væl kann spáast um. Av tí at ein lutfalsliga stórur partur av fólkavøkstrinum kemur frá tilflyting, er støðan í Føroyum øðrvísi, sí Mynd 10. Í fyrsta lagi er torført at spáa um hvussu nógv til- og fráflyting verður komandi árini. Í øðrum lagi er torført at spáa um teirra aldur og kyn.

Stóru sveiggini í til- og fráflytingini kunnu ávirka haldførið á ymiskan hátt. Flyta fólk í arbeiðsføra aldrinum av landinum, tá ið tey gerast arbeiðsleys, tænir tað stuttskygt almenna búskapinum, av tí at tað verður minni goldið í stuðuli. Hinvegin kunnu demografisku avbjóðingarnar versna, um tey ikki koma aftur, ella um lønin í útlondum hækkar meiri enn í Føroyum og dregur fólk í arbeiðsførum aldri úr arbeiðsmegini.

### Alment hall tarnar politiska smidleikanum í framtíðini

Í 2015 metti Búskaparráðið, at tað fór at krevja varandi fíggjarpolitisk afturhald áljóðandi 5 pst. av BTÚ, fyri at fáa javnvág í føroyska búskapin, í longdini.[6] Tað kundi gerast við øktum skattainntøkum, færri almennum útreiðslum ella broytingum í arbeiðsútboði.

Síðani tá hevur hákonjunkturin tikið dik á seg, og Føroyar eru nú í eini serliga góðari støðu, bæði hvat konjunkturi og heimsmarknaðarprísum viðvíkur. Av tí at báðir partar hava positivt árin á almenna búskapin, hevði verið væntandi, at vinningurin var størri í dag enn í 2015, eisini uttan broytingar í haldførinum.

**Færri fólk í vinnuførum aldri** Mynd 9




Viðm.: "Børn og eldri verða lýst sum persónar eldri enn 65 og yngri enn 15. Arbeiðsførur aldur er øll millum 15-65
Kelda: Hagstova Føroya.

**Til- og fráflyting hevur stóran týdning fyri føroyska fólkavøksturin** Mynd 10




Viðm.: Myndin skilmarkar fólkavøksturin (strika) í føðitali, frádrigið deyðatal (lilla) og nettotilflyting (blátt).
Kelda: Hagstova Føroya.

6 Sí Redegørelsen F15, Búskaparráðið, 2015 (*leinki*).

Verður sæð burtur frá óvanligum einstøkum inntøkum, hevur tað almenna tó havt munandi hall seinastu árini, sí Mynd 11.[7]

Hóast afturvendandi hallið seinastu árini hava Føroyar kortini ikki sett seg í hægri skuld. Í 2021 var samanlagda EGS-skuldin (ØMU) 33 pst. av BTÚ. Orsøkin er m.a. stórur nominellur BTÚ-vøkstur og at partabrøv hjá landinum eru seld. Tað merkir, at tað framvegis ber til at taka lán, fyri fíggja almenna nýtslu í eini møguligari komandi afturgongd, ella at gera almennar íløgur í t.d. samferðslukervi. Við framhaldandi halli, drivin av demografisku gongdini, má tó væntast, at skuldin so líðandi fer at økjast og tað fer í framtíðini at gera, at hesin møguleikin ikki verður varandi.

Okkurt bendir á, at føroyski búskapurin rættiliga skjótt fer at merkja avleiðingarnar av demografisku avbjóðingunum. Tað fer at vera meiri gagnligt at handfara avbjóðingarnar í góðari tíð, heldur enn tá ið tær gerast veruleiki.

**Alment hall hóast søguliga góðar tíðir**

Mynd 11




Viðm.: Myndin vísir samlaða leypandi lands- og kommunuyvirskotið. 2022 er ein forsøgn frá Búskaparráðnum. Einstakar inntøkur í 2022 áljóðandi 176 mió. Kr., ið svarar til 0,7 pst. av BTÚ og 212 mió. Kr. Í 2021, ið svarar til 0,9 pst. av BTÚ, eru drignar frá. Inntøkurnar stava frá de facto-sølu av ognum landsins, umframt óvanligan vinning frá søluni av donsku deildini hjá BankNordik.

Kelda: Hagstova Føroya og Búskaparráðið.

7 Óvanligu inntøkurnar fevna um: Óvanligt vinningsbýti í 2021 og 2022, orsaka av, at BankNordik seldi danska deild; almenna ognin í P/F Tjaldur vórðu seldar í 2022; avtøka av grunninum, sum umsat almennu partabrøvini í P/F BankNordik, umframt avtøku av grundkapitalinum hjá Landsbanka Føroya.

UDGIVELSER

## UM GREININGINA

Sum ein avleiðing av leiklutinum hjá tjóðbankanum í samfelagnum verða greiningar um búskaparlig og fíggjarlig viðurskifti gjørdar.

Greiningarnar verða givnar út leypandi og fevna m.a. um metingar av aktuellu konjunkturstøðuni og tí fíggjarliga støðufestinum.

Greiningin er sett saman av einari danskari, enskari og føroyskari útgávu. Um ivi er um neyvleikan í týðingini, er tann danska útgávan galdandi.


DANMARKS NATIONALBANK
LANGELINIE ALLÉ 47
2100 KØBENHAVN Ø
WWW.NATIONALBANKEN.DK



Ritstjórnin er liðug
8. desembur 2022



**Lasse Holm**
Senior bankanalytiker
*laho@nationalbanken.dk*

FINANSIEL STABILITET

**Thomas Rasmusen**
**Damsgaard Tørsløv**
Økonom
*trdt@nationalbanken.dk*

ØKONOMI OG PENGEPOLITIK


DANMARKS NATIONALBANK

## KONTAKT


**Ole Mikkelsen**
Kommunikations-
og presserådgiver

*omi@nationalbanken.dk*
*+45 3363 6027*

SEKRETARIAT
OG KOMMUNIKATION